**Granskingarráðið 20 ár**

Mín uppgáva í hesum hátíðarhaldi er at siga nakað um upprunan til lógina um Granskingarráð, og hvørjar hugmyndir lógu til grund fyri henni.

Okkara landsstýri varð skipað 10. september 1994. Míni málsøki vóru umhvørvis-, orku- undirvísingar-, herundir granskingar-, kommunu- og Norðurlandamál. Vert er at minnast tey búskaparligu og fíggjarligu viðurskiftini, sum ráddu í Føroyum um tað mundið. Hetta var beint eftir, at alt tað føroyska samfelagið hevði verið ígjøgnum eina ta djúpastu búskaparligu kreppuna í nýggjari tíð, og har hópur av fólki mátti flýggja frá húsi og heimi og søkja sær útkomuna í okkara grannalondum.

Eg hevði ofta hugsað um og ásannað, at ein av grundunum til, at nógv gekk so galið, sum tað gjørdi, var, at vitanargrundarlagið undir nógvum av teimum politisku avgerðunum var alt ov ófullfíggjað, og at meira gransking var eitt av teimum amboðum, sum kundi útvega politikarum eitt betri grundarlag at taka avgerðir út frá.

Eitt tað fyrsta málið, sum kom mær upp í hendurnar, var ein granskingarætlan fyri norðuratlantiska økið, sum føroyskir granskarar høvdu útarbeitt. 19. januar 1995 sendi eg beinan vegin danska granskingarmálaráðharranum, Frank Jensen, hesa ætlan, tí einsamallir megnaðu vit fíggjarliga lítið og einki at gera við hana.

Granskingarmálaráðharrin sendi uppskotið til tey nývaldu donsku granskingarráðini, Kommissionen for Videnskabelige Undersøgelser i Grønland (KVUG) og Dansk Polarcenter. Svarini frá hesum stovnum vóru positiv; men semja var um, at føroysk gransking skal verða fíggjað sjálvstøðugt, t.v.s. ikki beinleiðis frá donsku granskingarráðunum. Teirra kunnleiki um føroyska granskingarlandslagið hevur helst verið lítil og eingin, og tí varð avgjørt 13. desember 1995, at seta ein útgreiningarbólk av granskarum at greina føroyska gransking og tey viðurskifti, sum hava samband við hesa gransking.

Føroysku limirnir í hesum bólki vóru Bogi Hansen, deildarleiðari á fiskirannsóknarstovuni og Jóan Pauli Joensen , rektari á Fróðskaparsetrinum.

Frágreiðingin frá nevnda bólki av føroyskum og donskum granskarum, sum ber heitið "Forskning på Færøerne" varð alment handað mær longu 10. januar 1997. Tað er eingin ivi um, at henda frágreiðingin hevur havt alstóran týdning og hevur verið eitt vegamót í samband við menningina av føroyskari gransking. M.a førdi tað við sær, (1) at føroyskir granskarar á jøvnum føti kundu søkja stuðul úr teimum donsku granskingarráðunum, sum um tað mundið høvdu 700 mió. kr. at gera gott við. (2) Miljø- og Energiministeriet boðaði í mars 1996 frá, at teir veita 10 mió. kr. til umhvørvisverkætlanir í Arktis og í Føroyum. Sven Auken, umhvørvirmálaráðharri, segði, at programmið gongur í tíðarskeiðinum 1996-1998 við eini væntaðari árligari játtan uppá 10 mió. kr. (3) Harafturat vóru vit úti um okkum, tá ið Jytte Hilden gjørdi broytingar í donsku granskingarráðunum og setti Forskningsforum á stovn.

Í tí sambandinum skrivaði eg til hennara (eftir at hava fingið eina ábending frá Jóan Paula) og gjørdi vart við, at vit í Føroyum mettu tað ógvuliga týðandi, at tann norðuratlantiska granskingin fær síni áhugamál tilgóðasæð í Forskningsforum. Eftir brævaskifti aftur og fram

og ein góðan fund við Jytte Hilden, granskingarmálaráðharra í Keypmannahavn, var komið á mál. Niðurstøðan var, at 35 mió. kr. vórðu settar av á fíggjarlógini 1998 til norðuratlantiska gransking. Við hesum tilfeingismøguleikum høvdu vit frá landsstýrinum skapt fyritreytir fyri, at føroysk gransking nú hevði ein reellan møguleika fyri at menna seg á áður ókendan hátt. Somuleiðis kundi gongd koma á granskaraútbúgvingina. Stutt eftir at lógin um granskingsrráð varð samtykt, settu vit eisini kunngerð um Ph.D.-lestur á Fróðskaparsetri Føroya í gildi.

Um sama mundið, sum hetta fór fram, var Jóan Pauli Joensen limur í einum norðurlendskum arbeiðsbólki, sum skuldi arbeiða við einari verkætlan um Forskningspolitik og -strategi for Færøerne og Grønland, og teir komu við einum áliti í 1997 Forskningssamarbejde i Vestnorden.

Í september 1995 søktu vit í Undirvísingar- og mentamáladeildini fíggjarnevndina um at fáa eitt nýtt granskingarstað á fíggjarlógina fyri 1996: Granskingarætlanir, søkt varð um kr. 1.700.000 til fýra ávísar ætlanir. Fíggjarnevndin skerdi játtanina niður í 1 mió. Grundgivið varð sjálvandi væl frá landsstýrinum, m.a. varð upplýst, at vit arbeiddu uppá at seta á stovn eitt granskingarráð. Harvið vóru tingmenn kunnaðir um tað málið.

Eg var so heppin at hava Jákup Thorsteinsson, sum sjálvur var granskari og doktari sum deildarleiðara. Og eitt tað fyrsta, sum eg tosaði við hann um, var, at umframt, at eg hevði brennandi áhuga fyri skúlamálum, so hevði eg sett mær fyri, at vit máttu gera nakað fyri granskingina. Bæði tí at tað evnið var nógv uppi í tíðini, og tí at eg hevði havt nógv við Arna Nørrevang og hansara Biofar projekt at gera og sæð, hvussu lítið landsmyndugleikarnir megnaðu at stuðla tí ætlanini.

Sjálv tilgongdin til at fremja málið um eitt granskingarráð helt fram við, at vit 2. januar 1996 skrivaðu til Jóan Paula Joensen, rektara, har hann varð biðin at koma á fund 15. januar kl.14 at tosa um ætlanirnar við einum granskingarráði. Í staðin fyri bara at føla okkum fyri hjá rektaranum á Fróðskaparsetrinum, gjørdu vit av, at tað var meira rationelt at bjóða umboðum fyri einum víðari forum beinan vegin. Á fundinum vóru umboð fyri Fróðskaparsetrið, Náttúrugripasavnið, Fiskirannsóknarstovuna, undirvísingar- og mentamáladeildina hjá landsstýrismanninum, Heilsufrøðiligu starvsstovuna, Fornminnissavnið, Landsskjalasavnið, Deildina fyri arbeiðs- og almannaheilsu og Landsbókasavnið.

Eftir tann fundin 15. januar 1996 og eftir at vit í landsstýrinum høvdu orðað eitt útkast til uppskot til lóg um granskingarráð, varð tað sent nevndu stovnum til ummælis. Teir tóku væl ímóti tí, men allir vóru ónøgdir við, at einki stóð um, at ráðið skuldi vera við til at býta pengar út. Hetta bleiv sjálvandi bøtt um, við tað at ráðið skuldi viðgera umsóknir um granskingarstuðul og geva landsstýrinum tilmæli til, hvørjum stuðul eigur at verða latin av tí peningi, ið settur er av á fíggjarlógini.

25. mars 1996 varð málið lagt fyri løgtingið.
1. viðgerð 16. apríl sent í mentanarnevndina.

7. mai legði nevndin málið fram. Í álitinum stendur at til tess at tryggja, at nýggir grannskoðarar fáa høvi til at gerast limir í granskingarráðnum verður §3, stk, 3 broytt soleiðis, at formaðurin og limirnir kunnu ikki sita longur enn tvey skeið ísenn.
14. mai 1996 varð lógin endaliga samtykt við 21-2-6 atkv.

Sum tað framgongur av tí, sum her er nortið við, so varð rættiliga nógv sett í verk á økinum hesi árini. Latið varð upp fyri fleiri keldum, sum føroysk gransking hevði møguleikar fyri at søkja stuðul úr. Tann meira at kalla sporadiska granskingin, sum fór fram í Føroyum hevði tørv á einum savnandi almennum stovni, sum eisini kundi veita legitimitet fyri samarbeiðsverkætlanum við hini Norðurlondini og ES.

Lógin skuldi gera granskingina meira sjónliga. Hon skuldi styrkja føroyska gransking. Bøta um ráðleggingina og samskipanina av gransking.
Ein av høvuðsætlanunum við Granskingrráðnum var, at tað skuldi virka sum ein katalysator, sum við tíðini kundi seta rættiliga gongd á miðvísa føroyska gransking. Við tí einu milliónini á granskingarkontuni var eyðsæð, at hon gjørdi einki summar; men framtíðarætlanirnar vóru miðvíst at hækka hesa játtan, so at hon skjótt skuldi fara at muna. Neyðugt var eisini við eini strategi, sum kundi stinga kósina út. Henda fyrsta lógin var eitt barn av síni tíð, við sínum dygdum og lýtum. Viðmerkingarnar siga eisini, hví ikki varð broderað meira upp á hana tá, sum vit síggja, at gjørt varð við tí lógini, sum avloysti hana. Fyrst í 90-árunum ók føroyska samfelagið á knøunum, men síðani hevur stórt sæð gingið stútt framá, til vit í dag nærum ikki hava orð fyri, hvussu rík vit eru. Hetta er neyvan bara granskingini fyri at takka, men skal gransking eydnast og gerast ein týðandi faktorur í samfelagnum, so má hon hava rúmlig og álítandi fíggjarlig kor.

Ein av trupulleikunum, tá ið Granskingarráðið skuldi setast, var at finna limir, sum kundu lúka treytirnar í lógini, t.v.s at teir skuldu vera granskarar ella vera granskingarkønir, skuldu umboða ymisku granskingarøkini í landinum. Í minsta lagi helmingurin skuldi vera virknir granskarar. Tað, at so fá vóru at velja ímillum, er sigandi fyri støðuna hjá granskingini tá. Síðani er talið vaksið heilt munandi. Men í tí nýggju lógini um gransking hava teir illa nokk brúk fyri, at nakrir granskarar skulu vera uppi í.

Tann gamla lógin um Granskingarráð hevði sína tíð. Hon avrikaði júst tað, sum føroysku granskararnir brúktu hana til. Hon fekk ikki so langa ævi; men tað kunnu vit gleðast um, tí tað vóru tær búskaparliga betru tíðirnar, sum m.a. gjørdu av við hana og settu eina í staðin, sum hóskaði betur til sína tíð. Hvat ið útbúnaði viðvíkur plagi eg at hugsa mær ta gomlu lógina sum kirkjuna í Hvalvík og ta nýggju sum dómkirkjuna í Milano. Av útsjónd eru tær ymiskar, men boðskapurin er hin sami.